

# Orkusparingar í sethúsum og húsarhaldum

## Sum húsaeigari er nógv tú kanst gera fyri at minka um orkunýtsluna. Vaksandi orkuprísir og veðurlagsbroytingar gera eisini sítt til, at neyðugt er at hugsa um orkuna

Við vaksandi orkukostnaði í húsarhaldum og óhepnum fylgjum av veðurlagsbroytingum, tá vit brenna av olju og lívrunnum evni, kunnu húsaeigarar hvør í sínum lagi gera sítt til at minka um orkunýtsluna og at avmarka veðurlagsbroytingarnar.

Av samlaðu føroysku olju- og bensinnýtsluni í 2005 á 225.000 tons fóru 42 prosent til sethús, ravmagn, akfør og flogfør. Hetta svarar til 94.360 tons - tvey tons til hvønn íbúgva ella í miðal 7 tons til hvørt húsarhaldi. Útlátið av veðurlagsgassinum Co2 var tilsamans áleið 710.000 tons í 2005. Sostatt tekna húsarhaldini seg fyri 300.000 tons, ið eru 22 tons í part ella 6,3 tons pr. fólk.

### Bjálving loysir seg

Størsta orkunýtslan fer til upphiting av húsum og av vatni. Hetta svarar til í miðal 3 tons av olju til hvørt húsarhaldi, ella 36.000 kWh árliga. Við eini bústaðarvídd á í miðal 150 fermetrar, svarar hetta til 205 kWh fyri hvønn fermetur. Roknast kann við, at stórur partur av bústaðunum hava eina nógv hægri nýtslu, av tí at fleiri hús eru gomul og ikki bjálvað. Harafturat eru helst bæði gomul og nýggj hús, ið eru illa bjálvað, har gjóstur er ein trupulleiki. Hetta ger, at hitin hvørvur skjótt – serstakliga tá vindur er.

Danir meta at fimta hvørt sethús hevur tørv á eftirbjálving av útveggum. Talan er um góð 200.000 sethús. Íløgan er um 20-30.000 kr. fyri hvønn húsaeigara, sum samstundis sparir 600 litrar av olju. Sostatt hevur íløgan vunnið seg inn aftur eftir fýra til fimm árum við verandi oljukostnaði.

### Gjóstur kostar

Annað álvarsmál í mun til orkutap í sethúsum er gjóstur. Her vísa royndir hjá Erhvervs- og Byggestyrelsen at eini vanlig donsk sethús missa 33 prosent av hitanum aleina vegna gjóstur, tí húsini eru ótøtt. Verða húsini tættað ber til at spara góð 20 prosent.

Hvussu standurin er í føroyskum sethúsum veit eingin. Eingi hagtøl eru at finna, ið kunnu lýsa hetta. Men roknast kann við, at vit við nógva vindinum um okkara leiðir, hava eitt enn størri orkutap aleina vegna byggifusk, vánaligar og illa gjøgnumhugsaðar byggiloysnir, tørvandi bjálving og vindeygu við stórum orkutapi.

Danmarks Statistik hevur fólka- og bústaðateljing í Føroyum frá 1970. Tá eru 9.619 sethús, harav um 7.000 hava oljufýr og restin brenniovn, petroleumsbrennara og annað. Við í miðal 3,5 fólk fyri hvørt húski, eru 70 prosent av búeindunum 40 ár og eldri. Hetta kundi bent á, at støðan á sethúsamarknaðinum er nógv verri enn roknað verður við.

### Rútar og útlufting

Sum sagt, er fyrst og fremst neyðugt við betri bjálving. Kortini skal gjóstur fáast burtur fyrst. Gjóstur er ofta kring vindeygu, úthurðar og veggir, við sokkul, gólv og útveggir, har ventilar sita og har kaðalir verða førdir gjøgnum guvubyrging. Lættast er at bjálvað loftið. Til dømis við ber til at spara 500 litrar av olju árliga, við at nýta 25 cm bjálving. Vanliga halda termorútar í umleið 20 ár. Stór sparing fæst við at skifta til orkurút við A-merki, eisini sum termoglas. Um eitt nú 20 fermetrar verða skiftir út, fæst ein sparing á umleið 180 litrar av olju. Stórt hitatap fer fram gjøgnum sprossarnar í sprossavindeygum. Her fæst besta úrslitið við at seta forsats-



| 2005 | Olja/bensin | % | C02 | pr.húsarhald * | pr.íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|
| Sethús / húski | 40.500 | 43 | 129.000 | 9,41 | 2,69 |
| SEV | 30.000 | 32 | 96.000 | 7,00 | 2,00 |
| Akfør / flogfør | 23.860 | 25 | 75.000 | 5,47 | 1,56 |
| Tons í alt | 94.360 | 100 | 300.000 | 21,88 | 6,25 |